

## Breckmann og Frændur

Í 80'unum vóru teir at finna á hvør sínum vongi í føroyskum politikki – Óli Breckmann og Frændur – og stundum var kjakið bæði heitt og harðligt. Nú hittast Breckmann og Frændur til eitt kjak um protestsangir, friðargongur og politiskan tónleik.



## Connie í paradísi

Lygnir, sex og svik seta dám á sendirøðina Paradise Hotel, sum danska rásin TV3 sendir. Í ár er Connie Brockie úr Vági ein av luttakarunum í sendirøðini. Tosað verður við Connie um, hvussu hon fekk hug at bjóða seg fram til sendirøðina, og hvussu tað var at búgva á mærglætishoteli í Meksiko, meðan upptøkutól fylgdu øllum tí, sum fór fram.



## Tónleikagestir tulka Frændur

Sangirnir hjá Frændum verða sungnir til alskyns tiltøk, og tað munnu verða fáar veitslur kring landið, har onkur Frændur-sangur ikki verður sungin – líkamikið um tað er við sanghefti ella ikki. Hvonn Live hevur boðið nøkrum føroyskum tónleikarum at syngja ein sang hjá Frændum. Millum hesar eru Árni & Marnar, sum gera sína heilt egnu tulking av einum Frændur-sangi.



## Hvussu gongur hjá Popczynski?

Í átta ár var póllendingurin Krzysztof Popczynski spælari og venjari í føroysku fótbóltskappingini, og millum stóru avrikini hjá honum vóru føroyameistaraheitini við VB og HB. Í fjør fór Popczynski av landinum aftur, men hann virkar framvegis sum venjari. Vit finna fram til Popczynski og frætta, hvussu tað gongur hjá honum í hansara nýggja felagi.



## Hundalív í Signabø

Óluva Johannesen venur chihuahua-hundar, og ja, tað er eitt ordiligt hundalív í húsunum á Signabø, har Óluva húsast við 15 hundum. Óluva vitjar á Hvonn við hundi og greiðir frá, hvaðan áhugin fyri hundavenjing stavar, og hvussu tað er at hava so nógvar ferføttar vinir.

